# Kynslív og verja

Nemingabók, síða 42-54

Førleikar:

- At lesa og endurgeva einfaldar hugtaksmyndlar. At knýta hugtaksmyndlar til kvantitativa og kvalitativa vitan.
- At leggja fram faklig úrslit munnliga. At brúka ymiskar framløguhættir, m.a. eisini at brúka KT at stuðla framløgur við.

Fólkaheilsuráðið, Føroya Politi, Amnesty International og Sig frá/Almannamálaráðið hava í fleiri ár skipað fyri átaknum "Sex krevur samtykki!". Millum annað skriva tey soleiðis á heimasíðuni hjá Amnesty:

> SEX SKJÓT UM SAMTYKKI:
>
> 1. Samtykki kann bara gevast. Ikki takast!
> 2. Samtykki kann tó altíð takast aftur!
> 3. Samtykki krevur vit!
> 4. Samtykki krevur hug!
> 5. Samtykki er ítøkiligt. Tað merkir, at JA til A merkir ikki JA til B, og eitt JA nú merkir ikki JA um eina løtu.
> 6. Sex krevur samtykki!

Kjakist fyrst um hesi seks punktini, hvat tey merkja og hvussu tey skulu skiljast/tulkast.

Gerið síðani eitt leiklutaspæl í flokkinum, har nemingarnir koma út fyri tær seks støðurnar, ið eru nevndar omanfyri. Nemingarnir kunnu skiftast um at spæla leiklutirnar.

Les meiri um evnið á heimasíðuni hjá Amnesty International (Amnesty.fo)

